# Kappingin um Ársins Songrødd 2002 byrjað

**Leygarkvøldið fór fyrsta umfarið av Ársins Songrødd 2002 av bakkastokki í Badmintonhøllini í Havn Vinnarir av hesum umfarinum gjørdust 20 ára gamla Krsitley Hansen og 16 ára gamla Lena Maria Ellingsgaard**

ÁRSINS SONGRØDD
*Ragnhild Ellingsgaard*

Yvir 500 fólk høvdu leitað sær inn í Badmintonhøllina leygarkvøldið fyri vita, hvørjir fyrstu finalistarnir til Ársins Songrødd í 2002 fóru at verða.

Luttakarnir vóru 9 í tali, og skuldu 2 finalistar finnast. Hesir skulu saman við øðrum kappast um heitið sum Ársins Songrødd 2002 í finaluni, sum verður hildin tann 29. juni. Navnframi James Olsen er ein av fyrireikarunum aftanfyri tiltakið, og hevur hann eisini leiklut sum frásøgumaður. Við øðrum orðum greiðir hann frá, hvat hendir á pallinum, og meðan stigini verða tald upp, gevur hann eisini sítt ískoyti á pallinum.



### Fyrstu finalistarnir funnir

Kappingin er skipað á tann hátt, at 4 dómarar eru til staðar, sum meta um sang, framførslu og eisini sereyðkenni hjá luttakarinum. Teir geva so stig fyri hetta, men áðrenn uppteljingin gerst endalig, sleppa áhoyrarnir eisini at siga sína meining. Atkvøðuseðlar verða býttir út millum áhoyrarnar, og telja hesar atkvøður tilsaman eins nógv og ein dómaraatkvøða.

Tá øll hesi stig eru tald upp, gerst greitt, hvør sleppur víðari til finaluna.

Á fyrsta plássi leygarkvøldið legðist 20 ára gamla Kristley Hansen, meðan 16 ára gamla Lena Maria Ellingsgaard lá á einum øðrum plássi. Hesar báðar sleppa sostatt víðari til finaluna.

### Fleiri umfør

Skipað verður fyri fleiri umførum í øllum landinum, og er longu nærum fult teknað til øll umførini.

Ì Havn kom luttakaratalið so langt upp, at fyrireikararnir valdu at skipa fyri tveimum umførum einans í Havn.

Annars verður eisini skipað fyri umførum í Klaksvík, á Kambsdali, í Vági og í Hvalba.

Næsta umfarið verður longu tann 2. mars, og verður tað í Hvalba.

### Vinnarin 10.000 krónur

Tann 29. juni í ár verður finalan skipað í Badmintonhøllini í Havn, og skulu tveir finalistar frá hvørjum umfari tá kappast um heitið sum Ársins Songrødd 2002.

Vinnarin av øllum hesum umførinum fær, umframt heiðurin, eisini handað eitt gávukort áljóðandi 10.000 krónur, meðan Føroya Banki letur nummar tvey eitt gávukort á 5.000 krónur.

### Stórur áhugi

Frá fyrireikarunum frætta vit, at stórur áhugi er fyri tiltakinum í ár. Miðalaldurin á luttakarunum er hækkaður í mun til seinasta ár, og teir flestu hava vant nógv, áðrenn teir traðka á pallin. Hetta er ein stór broyting í mun til undanfarin ár, tá Ársins Songrødd meir hevur verið eitt stuttligt upplivilsi heldur enn ein verulig kapping.

- Tey flestu, sum hava meldað seg til, eru við fyri at vinna, og tað merkja vit eisini, siga fyrireikararnir.

# Tónleikafelag sett á stovn í Klaksvík

**Fríggjakvøldið varð fyri fyrstu ferð eitt tónleikafelag sett á stovn í Klaksvík.**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Meðan kavin leikaði á uttanfyri, sótu umleið 30 tónleikaáhugaðir klaksvíkingar inni í fjálgu býráðshøllini. Orsøkin var, at júst hetta kvøld skuldi eitt tónleikafelag fyri fyrstu ferð setast á stovn í Klaksvík.

Endamálið við hesum felagi er fyrst og fremst at fáa eitt meiri virkið tónleikaumhvørvi. Tað merkir at skipa fyri fleiri tiltøkum, fleiri konsertum og fjølbroyttari tónleikavirksemi annars.



*Hesi vóru millum tey fyrstu at tekna seg sum lim hjá nýggja felagnum*

### Fyribils nevnd sett

Ì byrjanini av fundinum fingu fólk høvi til at tekna seg sum lim hjá felagnum, og vísti seg at vera stórur áhugi fyri hesum. Heili 27 fólk teknaðu seg sum lim, og var hetta nærum alt fólki, ið var til staðar.

Síðani skuldi ein fyribils nevnd setast.

10 uppskot til val av nevnd vóru skotin upp, og av hesum 10 skuldu 5 veljast. Atkvøðuseðlar vóru býttir út til limirnar, og eftir uppteljingina varð greitt, at Gulli Johannesen, Hans Juul Nystrøm, Leivur Vitalis, Jan Gardar og Òlavur Simonsen skuldu manna hesa nevnd. Eykalimir gjørdust Oddur Olsen og Lois Poulsen.

Uppgávan hjá nevndini er so at seta eina fyribils endamálsorðing, eina fyribils reglugerð og at finna eitt navn til felagið. Hetta skal síðan verða lýst á einum aðalfundi skjótast gjørligt.

### Tørvur á slíkum felagi

Ì seinastu viku skipaðu fyrireikararnir fyri einum kunnandi fundi viðvíkjandi stovnan av einum tónleikafelag í Klaksvík.

À hesum fundi gjørdist greitt, at tónleikarar í Norðoyggjum uttan iva hava brúk fyri einum slíkum felag.

Sum er, hevur tónleikurin alt ov vánaligar karmar, venjingarhølini eru ov fá, og møguleikarnir fyri at framføra sín egna tónleik eru so at siga ikki til staðar.

Endamálið hjá felagnum er at broyta hetta, og annars verða við til at menna umstøðurnar her norðuri.

### Samstarv við Grót

Tað var tónleikasamtakið Grót, ið saman við øðrum skipaði fyri hesum fundum.

Grót varð sett á stovn í Eysturoynni í 1998, og hevur samtakið gjøgnum tíðina havt stór árin á tónleikalívið har um leiðir.

- Eitt tónleikafelag ger lívið so øgiliga nógv léttari hjá einum tónleikara, samstundis sum felagið eisini ger, at tónleikurin mennist og gerst fjølbroyttari.

Og eftir fundin í kvøld meti eg avjørt, at fortreytirnar eru til staðar fyri at fáa eitt virkið felag her norðuri. Fólk vístu stóran áhuga fyri felagnum, og eisini býráðið sýntist vilja hava eitt felag sett á stovn, greiddi Jón Tyril, formaður í Grót frá.

- Vit í Grót eru sera fegnir um, at enn eitt felag er sett á stovn. Vit høvdu ikki orku til eisini at taka okkum av Klaksvíkini, men hildu at klaksvíkinginar ístaðin áttu at havt sítt egna felag. Og vit eru heilt væl nøgdir við úrslitið í kvøld; vit vænta okkum nógv at hesum felagi, segði Jón at enda.

Ætlanir eru eisini um at seta á stovn eitt tónleikafelag í Havn, og skulu hesi trý feløg samstava um ymisk viðurskifti. Hetta verið seg at skipa fyri skeiðvirksemi, senda bólkar úr einum øki í annað og eisini at fáa nakrar virknar tónleikapallar í Føroyum.



*Um 30 tónleikaáhugað vóru til staðar hetta kvøldið*



# Flogtænari nýtti Atlantsflog til narkosmugling

**29 ára gamli maðurin, ið hósdagin fekk eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava smuglað hassj og kokain, starvaðist sum flogtænari hjá Atlantic Airways. Stjórin í flogfelagnum sigur, at hann og tey í felagnum kenna seg misnýtt í óreiðiligum virksemi**

SMUGLING
*Stefan í Skorini*



*Ein flogtænari hjá Atlantic Airways nýtti arbeiðsplássið til at smugla hassj og kokain til Føroyar. Maðurin játtaði seg sekan og tók við dóminum. Magni Arge, stjóri, sigur, at felagið kennir seg misnýtt*

Tá ákæruritið móti manninum, ið var ákærdur fyri smugling, varð lisið upp í Føroya Rætti hósdagin, legði ákærin dent á, at smuglingin var farin fram við flogfari.

Orsøkin til tað var, at maðurin í hesum tíðarskeiðnum starvaðist sum flogtænari hjá Atlantic Airways, tí almenna føroyska flogfelagnum.

Tann ákærdi játtaði at hava smuglað tvey kilo av hassji og 54 gramm av kokaini og varð dømdur til eitt ár handan rimar.

Ákæruritið hevði tríggjar ákærur. Tann fyrsta var, at maðurin einaferð í 2000 hevur smuglað eitt kilo av hassji. Tann næsta var, at hann á vári ella á sumri í 2001 hevur smuglað hálvtannað kilo av hassji. Maðurin játtaði bara at hava ført eitt kilo til Føroya í hesum førinum. Triðja ákæran var, at maðurin hevur smuglað 63 gramm av kokaini í einum tíðarskeiði frá miðskeiðis í 2000 til september 2001. Maðurin játtaði bara at hava smuglað 54 gramm av kokaini, og dómarin tók frágreiðingina hjá tí ákærda til eftirtektar.

Maðurin tók við dóminum og fór beinanvegin inn at sita.

### Kennir seg misnýttan

Sosialurin fekk fatur í Magna Arge, stjóra í Atlantic Airways, og setti honum spurningin, um hann kennir seg misnýttan.

– Ja, tað kann eg siga, at vit kenna okkum misnýtt í hesum málinum. Starvsfólkið hjá okkum fær eitt stórt álit litið uppí hendi. Tað er tí greitt, at vit kenna okkum misnýtt, so tað stendur eftir í. Viðkomandi hevur forbrotið seg móti arbeiðsplássinum og ímóti sínum starvsfeløgum, sigur Magni Arge.

Hann sigur annars, at tey í felagnum taka hetta málið sera álvarsamt, tí tað er umráðandi hjá teimum at hava gott samstarv við allar myndugleikar á økinum. Felagið væntar av teirra starvsfólki, at tey halda allar galdandi reglur.

Flogtænarin var í starvi hjá Atlantic Airways til summarflúgvingin endaði á sumri 2001. Magni Arge sigur, at orsøkin til uppsøgnina als einki samband hevði við smuglingina, tí hetta var hann ikki vitandi um tá.

Tað var ikki fyrr enn 16. januar, tá maðurin varð tikin eftir umfatandi húsarannsóknir, at tey í felagnum fingu frænir um tað ivasama virksemið.

### Øll verða kannað

Elsa Brimvík, leiðari á tolleftirlitinum á flogvøllinum, sigur, at øll koma undir sama eftirlit í tollinum á flogvøllinum.

– Starvsfólk á flogførunum verða kannað eins og øll onnur vanlig ferðafólk, sigur Elsa Brimvík og leggur afturat, at tað ikki liggur betur fyri hjá einum slíkum starvsfólki at smugla enn hjá øðrum.

Tað skerst tó ikki burtur, at eitt starvsfólk á einum flogfari hevur góðar fortreytir at leggja slíkt virksemi til rættis.

Magni Arge sigur, at avleiðingin av hesum er, at tey kanska vera eitt sindur meira varin við slíkum í framtíðini. Hann leggur annars afturat, at hann hevur fult álit á núverandi starvsfólki, og hann er sannførdur um, at hetta bara hendir einaferð.

# Carmi Gillon áhuga at koma til Føroya

**Ísraelski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, kemur møguliga til Føroya á vitjan eins og sendiharrin, ið sat undan honum**

SENDIHARRAVITJAN
*Stefan í Skorini*



*Carmi Gillon hevur áhuga at koma til Føroyar. Enn er tó eingin innbjóðing send honum*

Felagið »Vinir Ísraels í Føroyum« hevur havt samband við nógv umrødda ísraelska sendiharran í Danmark, Carmi Gillon.

Formaðurin í felagnum, Dánjal Poulsen, væntar, at sendiharrin møguliga fer at leggja leiðina til Føroya.

Enn er eingin almenn innbjóðing send Carmi Gillon, men felagið hevur havt samband við hann, og eingin ivi er um, at hann er hugaður at koma hendavegin.

### Rok í Danmark

Mikið rok stóðst, tá Carmi Gillon tók við starvinum í Danmark í september í fjør. Orsøkin var, at hann hevði sagt, at hann tók undir við at leggja trýst á fangar undir avhoyringum.

Hann varð ein einum politikara meldaður til løgregluna, sum tó einki gjørdi við málið.

Carmi Gillon starvaðist í fleiri ár innan GSS (General Security Service), ið eisini er kent sum SHABAK. Hetta er trygdartænastan í Ísrael og hevur antiyvirgangsvirksemi í fremstu røð. Hann var leiðari í GSS í árunum 1995-96.

Í 2000 varð hann settur sum leiðari fyri Peresmiðstøðini fyri Friði, og síðani er hann vorðin sendiharri í Danmark.

HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumpy 1,9TD
8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xantia
1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II
2,0 HDi stc. 5H
km. 100.000, árg.sept. 1999
158.000,-

Citroen Xantia
Exclusive 3,0 V6
km. 62.500, árg. juni 1998
165.000,-

Citroen Xsara
2,0 HDi 5H
km. 20.000, árg. sept. 1999
153.000,-

Citroen Xsara
2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Mitsubishi L300
2,5D Vøruvognur
km. 161.000, árg.juni 1994
75.000,-

Mitsubishi Lancer
1,5GLXi 5H
km. 118.000, árg. juni 1992
Sýnaður 12'01

Ford Escort 1,8D
CLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
Sýnaður 06'01 45.000,-

Ford Escort
1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. juli 1996
70.000,-

Hyundai Accent 1,3
LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda E2200
Vøruvognur
km. 91.500, árg. mar. 1997
Sýnaður 06'01 95.000,-

Peugeot 306 D
4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Seat Cordoba 1,9 SDi
STC. 5H
km. 35.500, árg. Aug. 1999
125.000,-

VW LT31
vøruvognur
km. 148.000, árg. okt. 1993
v/ mvg 55.000,-

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820